# FØÐINGAR



*1. juli fingu Anna og Bjørn Westfahl ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3710 gr. Tey búgva á Marholmen í Svøríki. Hann eitur Jacob.*

19. juli fingu Sólrun og Palli Gregersen, Norðragøtu, ein son. Hann var 38 cm langur og vigaði 1000 gr.

23. juli fingu Heidi og Schumann Didriksen, Reykjavík, tvíburðar, gentu og drong. Gentan vigaði 2400 gr. og var 48 cm long, drongurin vigaði 3400 gr. og var 50 cm langur.

23. juli fingu Eileen og Kári Olsen, búsitandi á Amager, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

26. juli fingu Maria Matras Hansen og Pól Niklái Thorkildshøj eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3600 gr.

26. juli fingu Gitte Helledig Jørgensen og Bogi Dam, Ålborg, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2750 gr.

27. juli fingu Christina Nolsøe og Klæmint Isaksen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

27. juli fingu Nomi og Edvard Pauli Ejdesgaard, Eiði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

28. juli fingu Daimi og Heri Mikkelsen, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3850 gr.

28. juli fingu Alis Jacobsen, Skálabotni, og Jonleif Christiansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3450 gr.

29. juli fingu Jóhanna Hansen, Sørvági, og Jóan Martin Olsen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4050 gr.

31. juli fingu Guðrun Gudmundsen og Stefan Simonsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3300 gr.

31. juli fingu Silvurlýn Simonsen og Jan Breiðaskarð, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

1. august fingu Ramona og Flemming Petersen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3450 gr.

2. august fingu Judi Holm og Beinir Davidsen, Kollafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3550 gr.

2. august fingu Sólfríð Jacobsen og Bjørn Fjallsbak, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

2. august fingu Annika Nolsøe, Dali, og Áki Olsen, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

# ANDLÁT

**28. juli**
Elsebeth Sofía Hansen, vanliga nevnd Ebba Fía, av Húsum, 74 ár.
Karl Vang, úr Kaldbak, 83 ár.
Edvard Niclasen, í Tórshavn, 58 ár.
Anna Kristina Jacobsen, í Tórshavn, ættað úr Hósvík, 67 ár.

**29. juli**
Poula Fjallsbak Poulsen, ættað av Skarði, búsitandi í Klaksvík, 86 ár.
Mina Niclasen, í Tórshavn, 88 ár.

**31. juli**
Dánjal Petersen, vanliga nevndur Dánjal í Skóbúðini, í Tórshavn, 73 ár.
Hans Erik Poulsen, úr Klaksvík, 72 ár.
Edva Sørensen, av Viðareiði, 89 ár

**1. august**
Sára Østerø, í Klaksvík, 55 ár.

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur 7. sunnudag eftir Trinitats

*Havnar kirkja:* Bjarni Bæk kl. 11
*Vesturkirkjan:* Heri Joensen kl. 11
*Kirkjubøur:* Heri Joensen kl. 12.15
*Vestmanna:* Inga P. Dam kl. 11
*Haldarsvík:* M. R. Jacobsen kl. 11
*Tjørnuvík:* M. R. Jacobsen kl. 12
*Fríðrikskirkjan:* Gert Nicolajsen og Jónsvein Bech kl. 11, altargongd. Luttøka av kirkjukóri frá Vorgod kirkju
*Gjáar kirkja:* Emil Olsen kl. 12, messa
*Christianskirkjan:* Niels Pauli Danielsen kl. 11, altargongd
*Mikladalur:* Hans Eiler Hammer kl. 12, altargongd
Talvan gongur í *Klaksvíkar* og *Árnafirði* fyri Sjómansmissiónina
*Sandavágs kirkja:* David Johannesen kl. 11, altargongd
*Sands kirkja:* Kjartan Mørkøre kl. 12
*Tvøroyrar kirkja:* P. M. Rasmussen, altargongd

## Ebenezer

Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti. Sunnukvøldið kl. 21: Útimøti.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11: Møti og sunnudagsskúli.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 6.
Øll eru vælkomin.

## Nardus Samkoman

Møti við evangelisti Torkild Terkelsen verða í Losjuni, Tinghúsvegur 18 leygarkvøldið 5. aug. kl. 20.00 ogsunnudagin 6. aug. kl. 16. Ungdómur úr Noregi luttekur saman við samkomuni. Øll eru vælkomin.

## Meinigheitshúsið í Havn

Sunnukvøldið kl. 18: Blákrossmøti v/ luttøku av Símin Joensen og øðrum.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn. Í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgunmøti, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti. Mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin.

## Glæman, Kvívík

Møti verður sunnukvøldið kl. 18 v/ John S. Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

## Filadelfia, Sundalagið

(Í Samkomuhúsinum í Hósvík)
Í kvøld kl. 19.15: Útimøti við Rhema framman fyri Samkomuhúsinum í Hósvík, kl. 20: Møti við Pola Jacobsen og Bill Justinussen.
Sunnukvøldið kl. 18: Møti við luttøku úr Rhema.

## Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Jón Miðberg, sum talar og syngur.
Hóskvøldið kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6–7.

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 5. aug.:* Leif Mosekilde, tlf. 447010
*Sunnudagin 6. aug.:* Tormóður Stórá, tlf. 441086

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin 5. aug.:* Marianne Ekberg, tlf. 286460
*Sunnudagin 5. aug.:* Marianne Ekberg, tlf. 286460

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## Keldan í Skálafirði

Leygarkvøldið 5. aug. kl. 21: Opið hús.
Sunnukvøldið 6. aug. kl. 19: Møti við Jónfinn Olsen.
Tú ert vælkomin í Kelduna.

## Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 6. aug. kl. 16 heldur Johs. A. Næs fyrilestur um kirkjusiðir í Leirvíkar kirkju. Felagskórið Gøta/Leirvík syngur.

## Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnukvøldið kl. 19 við Maureen Djurhuus. Øll eru vælkomin.

## Betel, Vágur

Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00. Evangeliskur fundur kl. 18.00. Útifundur kl. 21.00.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00.

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnukvøldið kl. 18 verður møti v/ Magnus Hansen. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Reyði Krossur Føroya

Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

## Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR

Sunnudagin 6. august verður gingið niðan á Murufelli og Konfelli. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14. Havið góð og heit gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

## Tilhaldið í Tórsgøtu 21

Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Frá 3. juli til 21. august er opið mánadag–fíggjadag kl. 14.00–18.00.*
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## AA-fundir í Havn

Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin kl. 17.00–18.00. Sunnudagin kl. 11.00–12.00 og evnisfundur kl. 20.00–21.30. Mánakvøld kl. 20.00–21.00.

## Al-Anon fundir í Havn

Fundir eru hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21.00 á Vaskarínum.

## AA-fundir í Eysturoy

Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla lærarabúðin).

## *Eitt ljós á gøtu míni*



*»… Blóð bróður tíns rópar til mín frá jørðini«.* 1. Mós. 4.10 B

Ja, tað rópar hart um synd Káins: um hvussu ljótt tað er at vera øvundsjúkur og hatisfullur – og hvussu ræðuligt tað er, tá ið eitt menniskja slær eitt annað íhel. Í Guds mynd eru vit øll skapað. Hugsa tær, at spilla Guds egnu mynd, bróta hana heilt sundur!

Men nógv annað hevur rópt til himmals upp síðan dagar Káins. Ikki bara blóðblettar og blóðfossar frá øllum drápum, sum framd eru á foldum. Men eisini agg, vreiði, hatur, øvund, skaðafrøi, beiskleiki, øll ljót orð og óndir tankar. Minst til bíbliuorðið í relatión til tekstin: »Hvør tann, sum hatar bróður sín, er manndrápari«, 1. Jóhs. 3.15. Um vit bara høvdu hoyrt tey róp og skríggj, sum eru stigin upp til himals og dagliga gera tað, mundu vit ikki gjørst ræðslusligin av øllum hesum illskapi? Tey rópa um hevnd og straff.

Men veitst tú hvat stendur eina aðrastaðni í Halgubók? At runnið hevur annað blóð, sum »talar betur enn Ábels«. Tað er blóð Jesu Krists. Hvat man tað tala um? Jú, um náði og bjarging, um Guds ósigandi kærleika til okkum annabørn. Lurta eftir tá ið tú hoyrir um blóðið, sum rann á Golgata. Tað reinsar okkum frá allari synd. Tá verða vit glað.

Av Golgata heyggi hon rennur,
hin blóðkelda, rein og góð,
og sælur er hvør ein, sum kennir
ta lívsins frelsandi flóð.

Amen!

**John S. Myllhamar, trúboðari**



## Eysturoyar Gongufelag/kunningarstova

Gongutúrur verður sunnudagin 6. august. Gingið verður niðan á Skarð millum Fuglafjørð og Hellur. Túrurin er miðal og er í sambandi við árliga fólkafundin á Skarðinum, sum Fuglafjarðar Fornminnafelag skipar fyri. Vit møtast við Eysturoyar Kunningarstovu í Fuglafirði klokkan 14.00. Havið matpakka við.

## LISA

*skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya* í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

## Kvinnuhúsið

svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## Amnesty International Føroya deild

*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

## Føroyskir fiskimenn uttanlands

tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

## Bahá'í Miðstøðin í Gundadali

er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2. og 4. hvørt mikukvøld: drekkamuður, óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamuður aftaná.
***Bahá'í-samfelagið í Tórshavn***

## Felagið Føroyar-Kuba

P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

## Føroya Astma/ Allergifelag

Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

## Føroya Felag Móti Krabbameini

Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

## Javni

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí frá 15. juni. Ringjast kann til Dianu í Puntabyrgi tlf. 216510 ella Onnu Elisabeth Victorsdóttir, aftaná arbeiðstíð tlf. 315960.

## Epileptikarafelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

## MBF

MBF-skrivstovan fer í summarfrí tann 17. juli fram til mánadagin 21. august.

## Deyvafelag Føroya

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

## Nærvarpið LUMI radio í Aalborg

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

## Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

## Føroyska nærvarpið í Esbjerg

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

## Føroysk møti

Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

## Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni

Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36773820.

## Før. gudstænasturnar

í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

## Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

## Malta, Hirtshals

*Sunnudag:*
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
*Mikukvøld kl. 20:* Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
*Samkoman Malta*
*í Hirtshals*

## Føroyingafelagið í Esbjerg

*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

## Føroyskt barnamøti

Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Heimamissiónin

Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

## Føroyingarfelagið í Aalborg

*Lille Kongens Gade 10 B.*
*Tel. 98136330*
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

## Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail:
postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 16.00–19.00.

## Føroyingafelagið í Århus

***Vestergade 48 D***
***8000 Århus C***
***Telefon og fax: 86180604***

***Teldupostur:***
***aarstova@teliamail.dk***
***Heimasíðan:***
***http://welcome.to/aarstova***
**Áarstova er opin soleiðis:**
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.
**Onnur reglulig tiltøk í Áarstovu:**
**MFS.** Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.
**Føroyskur barnaskúli** annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólíka vikur).
**Sunnudagsskúli** annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).
**Bókasavn.** Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.
**Ítróttartiltøk:**
**Flogbóltur.** Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.
**Svimjing.** Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.
**Fótbóltur.** Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

## Føroyingafelagið í Reykjavík

Ølduslóð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

## Føroyingar í Noregi

**E-mail:**
**foroyar@norden.no**
**Heimasíða:**
**http://www.norden.no/foroyar**
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

## Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen

Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

## Silvurbrúdleyp

**Mikudagin 23. august hava hjúnini Dinna og Eyðun Jacobsen, Glyvrar, silvurbrúdleyp.**
**Dagurin verður hildin fríggjadagin 25. august kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum henda stóra dag, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. august á tlf. 448355 ella teldupost: eydunj@post.olivant.fo**

## Prógv

***Ann Hjelm, Vági, hevur tann 31. juli lokið prógv sum ídnaðarlaborantur á Teknisk Akademi Syd Esbjerg.***

## Brúdleyp

**Í dag, 5. august, giftast í Emmersbæk kirkju í Hirtshals Annika Jacobsen og Kim Durhuus úr Hósvík.**
**Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Hotel Tannishus í Tversted.**

**Í dag, 5. august, kl. 15.00 giftast í Fuglafirði Bjørg Mohr, Fuglafjørður, og Leif Anderssen, Canada.**
**Vælkomst verður í Siloa kl. 21.00. Hjartaliga vælkomin.**

***Í dag, 5. august, giftast í Prestagarðinum á Nesi Janni Mikkelsen úr Søldarfirði og Dan Magnusson Olsen úr Rituvík.***
***Tey, ið ynskja at hitta brúðarparið, eru vælkomin til ein drekkamunn í Rituvík eftir kl. 20.00.***

**Í dag, 5. august, giftast í Tórshavn Hervør Eyðinsdóttir og Helgi Jacobsen.**

**Í dag, 5. august, kl. 16.00 giftast í Hebron á Argjum Joan Agnarsdóttir Petersen, Tórshavn, og Eiler Rasmussen, Skála.**
**Veitslan verður kl. 19.30 í Pálsstovu, Mykinesgøtu 7, Tórshavn.**

**Í dag, 5. august, kl. 16.00 giftast í býráðshúsinum, Klaksvík, Sunneva Olsen og Poul Arni Poulsen, bæði úr Klaksvík.**
**Brúdleypið verður hildið í Skálanum fyri innbodnum kl. 19.**

**Í dag, 5. august, kl. 16.00 giftast í Miðvágs kirkju Malla Lið og Georg Hansen úr Miðvági.**
**Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, eru vælkomin inn á gólvið hjá teimum eftir kl. 19.00.**

**Í dag, 5. august, kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Paula K. Niclasen og Albin Johannessen, bæði úr Klaksvík og búsitandi í Keypmannahavn.**
**Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 19.00.**

**Leygardagin 12. august kl. 16.00 giftast í Havnar Kirkju Kristina Danielsen, Argir, og Ronnie Kjærbo, Hoyvík.**
**Veitsla verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.**

**Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Maria Mohr Edvinsson, Sandi, og Egin Herup Høgnesen, Hoyvík.**
**Vælkomst verður í B36-húsinum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarligast biðin at siga frá innan 5. august á tlf. 313610, 319659, 219512 ella 361026.**

**Fríggjadagin 18. august kl. 15.00 giftast í Siloa í Fuglafirði Maria á Lakjuni, Fuglafirði og Bjørn Simonsen, Klaksvík.**
**Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 444404 ella 456252 innan 6. august.**

**Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Herlufsholm Kirke, Næstved, Einar Jón S. Hansen, Skopun, og Ann K. Jensen, Næstved.**
**Veitsla verður fyri innbodnum í Tjæreby Forsamlingshus við Skelskør.**

**Leygardagin 19. august kl. 16.00 giftast í Leirvíkar kirkju Hanna Y. Sólbjørg og Jonhard Høgnesen, bæði úr Leirvík.**
**Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 6. august á tlf. 443273 ella 443122.**

**Leygardagin 26. august kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Winnie Trondesen, Skálavík, og Marnar Andreasen, Tórshavn.**
**Vælkomst verður í Havnar Klubba kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá innan 10. august á tlf. 314381, 312552 ella 361236.**